## Nýggjur læknaformaður

Á eykaaðalfundi í Læknafelag Føroya varð Tormóður Stórá valdur til nýggjan formann í felagnum. Hann avloysir Jens Andreasen, sum hevur verið formaður seinastu árini og ikki ynskti afturval. Læknafelag Føroya er høvuðsfelagið hjá øllum læknum í Føroyum. Hinir nevndarlimirnir í felagnum eru Sten Larsen og Jaspur Petersen fyri kommunulæknarnar, Hans Jákup Simonsen og Erik Wandall fyri serlæknarnar og Jan Rasmussen og Jóna Hansen fyri Yngru læknarnar.



## Evnisdagar á Kambsdali

Dagarnar 3. til 5. mars hava næmingarnir í Studentaskúlanum á Kambsdali evnisdagar. Hesar dagarnar er vanliga undirvísingin niðurløgd, og í staðin arbeiða næmingarnir við alskyns evnum, sum í flestu førum ganga tvørtur um vanligu fakmørkini. Íalt eru 14 ymiskir bólkar, ið fevna um alt møguligt frá fyrstuhjálp og genspleysing umvegis franskan mat til tónleik og sjónleik. Mikukvøldið enda evnisdagarnir við eini kvøldsetu, har ymsu bólkarnir fara at leggja tað fram, sum teir hava arbeitt við. Kvøldsetan verður mikukvøldið 5. mars kl. 19 og endar umleið kl. 21.30.

# Ólekjandi sár á náttúruna



*Sum sæst eru greflig sár allan vegin heim eftir Urðini. Myndin er tikin av sjónum, og lætt er at síggja, at brimið hevur verið øgiligt*
*Mynd: Jens Kjeld Jensen*



*Myndin er tikin úr sessinum í niðaru Túgvu og heimeftir. Tveir sessir heimanfyri eru heilt burtur, og um tað einaferð verður fleygandi aftur har, kann bert tíðin vísa.*
*Mynd: Rene Hansen*



*Hendan myndin er úr Grátinum - har ein sessur er, sum tó kann fáast til sess aftur – og suður móti Hvíturðini, har tveir sessir vóru. Har fleygast neyvan aftur*
*Mynd: René Hansen*

**Sum nevnt fyrr í Sosialinum, gjørdi brimið 31. januar av við heilar fimm av teimum tólv fleygasessunum á Urðini í Nólsoy**

ÓDNARVEÐUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Náttúrukreftirnar eru óhugnaligar, og hvussu sterkar tær eru, eru myndirnar her á síðuni prógv um.

Ikki bert eru fimm av teimumtólvfelygasessunum á Urðini í Nólsoy skolaðir burtur, men eitt stórt búðøki hjá lundanum er somuleiðis burtur.

Júst hvussu hetta fer at ávirka stovnin í oynni, fæst sjálvandi einki at vita um, fyrr enn lundin tekur land móti sumri. Men tað stendur í hvussu er fast, at teir fimm fleygasessirnir, sum eru skolaðir burtur, verða ikki gjørdir aftur.

Kanska tað fer at vísa seg at bera til, at gera nýggjar sessir onkra aðrastaðni á Urðini, men tað fer at taka fleiri ár, áðrenn staðfestast kann, um hetta letur seg gera.